*Dagf. 24. november 2025*
*HMR j. nr. 25/30275-5*

**Súsanna Bertholdsen**
**landsstýriskvinna**

***Svar***

***upp á***

**Fyrispurning nr. 52-046/2025 eftir § 52a í tingskipanini, um bróstkrabbaskanningar, frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu**

**Spurningarnir vóru soljóðandi:**

**Spurningar**:

1. Eru ætlanir um at byrja MR-bróstkrabbaskanningar í Føroyum?
2. Um ja, nær kunnu hesar skanningar fara í gongd?
3. Hvørji kundu serstakliga havt gagn av MR-bróstkrabbaskanningum í mun til mammografi, sum nýtt verður í Føroyum í dag at kanna og staðfesta bróstkrabba?
4. Hvørjir møguligir fyrimunir eru við MR-bróstkrabbaskanningum í mun til mammografi og eru nakrir vansar?
5. Hvør er metti kostnaðurin av lutvíst ella heilt at skifta frá verandi kanningarhátti og til alternativa kanningarháttin?

**Svar:**

**Til spurning 1 og 2**
Spurningurin kann skiljast uppá tveir mátar.

Fyri tað fyrsta. Um vit skulu broyta verandi kanningarhátt í sambandi við bróstscreening, har mammografur verður nýttur í dag, til í staðin at nýta MR-skannara í framtíðini, so er svari nei til hendan spurningin. Sambært Sjúkrahúsverkinum verður hesin kanningarháttur ikki nýttur til bróstscreening. MR-skanningar verða einans nýttar sum ískoyti til mammografiskanningar.

Hin spurningurin er, um vit skulu gera MR-bróstskanningar í Føroyum. Í hesum sambandi skal nevnast, at tað í Krabbameinsætlanini frá 2022 varð mælt til at keypa nýggjan MR-skannara, sum hevur nýggjasta tøkni, sum m.a. kann nýtast til at diagnostisera prostatakrabba og útgreina arvaligan bróstkrabba.
Ein tílíkur MR-skannari varð fingin til vega í Sjúkrahúsverkinum í fjør, og um ársskiftið vórðu allar prostataskanningar hjá føroyskum monnum framdar við nýggja MR skannaranum á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Eisini hevur tað verið umrøtt í leiðsluni, hvussu farast skal fram við MR-skanningum av bróstum í samráð við serlæknar á viðkomandi økjum. Sambært Sjúkrahúsverkinum er í løtuni ongin endalig støða tikin til, nær og hvussu farast kann undir at bjóða MR-skanningar fyri bróstkrabba.

Tað er vert at nevna, at tá ið tað er illgruni um arvaligan bróstkrabba (t.d. BRCA), so fáa kvinnurnar tilboð um útgreining á Genetisk Center á Ríkissjúkrahúsinum. Tær, sum fáa staðfest arvaliga bróstkrabba, verða fylgdar í bróstambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum av mammakirugi og fáa í dag gjørt MR-skanningar í Aalborg. Talan er um heilt fáar kvinnur árliga, og tí kann tað sambært Sjúkrahúsverkinum verða trupult at uppbyggja og viðlíkahalda røttu fakligu førleikarnar á økinum í Føroyum.

**Til spurning 3 og 4**
MR-bróstskanning verður serliga nýtt til kvinnur, sum eru í hægri vanda fyri at fáa bróstkrabba vegna ílegubrek (t.d. BRCA), umframt til kvinnur sum fáa kemoviðgerð fyri bróstkrabba áðrenn skurðviðgerð (neoadjuverandi kemoterapi)[1].

Evropeiskar leiðreglur viðmæla, at MR-skanning verður lagt afturat sum "tilpassað" screening hjá kvinnum, sum ikki eru sjúkar, men hava tættan bróstvevnað, og ikki sum standardscreening hjá øllum kvinnum.

Fyrimunir við eini MR-bróstkanning eru sambært Sjúkrahúsverkinum hesir:

- Høgur sensitivitetur, sum kann fanga fleiri krabbameinstilburðir hjá kvinnum við tøttum bróstvevnaði, og hjá kvinnum har bróstkrabbi er arvaligur, umframt hjá kvinnum har fleiri knyklar eru í sama brósti.
- Við MR-skanning verða røntgenstrálur ikki nýttar.
- MR-skanning gevur góða mynd av støðuni hjá kvinnum, sum fáa kemoviðgerð fyri bróstkrabba, áðrenn skurðviðgerð (neoadjuverandi kemoterapi).

Vansar við eini MR-bróstkanning eru sambært Sjúkrahúsverkinum hesir:

- MR-skannarin finnur eisini tað, sum ikki er krabbi (hægri spesifisitetur), og tí kunnu sjúklingar verða útsettir fyri at gera fleiri óneyðugar kanningar, so sum ultraljóð og biopsiir.

[1] Endamálið við neoadjuverandi kemoterapiviðgerð er at minka um krabbaeinsknútin, soleiðis at tað gerst lættari at skurðviðgera.

- MR-skanning tekur longri tíð, og er tí dýrari í rakstri.
- Mammografi klárar betri enn MR-skannarin at síggja mikrokálkingar, sum kunnu vera tekin uppá byrjandi bróstkrabba. Her kann MR-skannarin ikki fanga ella gera møguligar kálkingar nóg sjónligar.

**Til spurning 5**
Sum áður nevnt er í løtuni ongin endalig støða tikin, nær og hvussu farast kann undir at bjóða MR-skanningar fyri bróstkrabba, og tí er heldur ongin kostnaðarætlan tøk.

Heilsumálaráðið, 24. november 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna